# Eingin verðsligur tónleikur er til



**Um Guð hevur skapt heimin, so er tónleikurin í heiminum ikki verðsligur, sigur Martin Joensen, sum á Fjarðafestivalinum á fyrsta sinni skal royna seg á einum kristiligum tónleikafestivali**

SAMRØÐA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

- Um kristindómurin hevur rætt, og Guð er til og hevur skapt heimin, er so nakar verðsligur tónleikur til? spyr Martin Joensen, sum á Fjarðafestivalinum fer á pallin saman við tí besta innan kristiligan tónleik í Føroyum og stórum útlendskum gospel nøvnum sum Pillar og Jerusalem.

- Tá Fjarðafestivalurin spurdi meg, um eg hevði hug at luttaka á festivalinum, so var mítt fyrsta svar, Jamen, eg spæli ikki ikki gospel, sigur Martin, um luttøkuna á stóra kristiliga festivalinum í Skálabotni. Men hann metur tað tó ikki vera eitt óvæntað stig, at heitt verður á hann at luttaka á Fjarðafestivalinum.

- Flestu sangirnir á míni seinastu fløgu, Á Brúnni, eru gjørdir í míni sjúkraperiodu, og meðan eg var í kemoterapi, og nógvir av teimum eru andaliga funderaðir. Eg havi tó ongantíð kent tað sum eina treyt at nevna Várharra ella Halleluja, tá eg skrivi andaligar ella kristnar sangir til mín sjálvs. Í mínum føri lýsi eg mína støðu, t.d. í sanginum "Sólin Hevur Sæð" av fløguni "Á Brúnni". Tann sangurin lýsir væl byrjanina til mín áhuga fyri kristindóminum, sigur Martin, ið er, sum hann sjálvur sigur tað, ein heilt vanligur limur í fólkakirkjuni, sum eisini vitjar Heimamissiónina. Martin sigur, at hann setur stóra æru í, ikki at gera eitt stórt lop í síni sangskriving, hetta sjálvt um Guð hevur fingið ein alt størri leiklut í hansara lívi. Hann skrivar tó eisini fegin "reinar" gospelsangir, og hevur eitt nú skrivað sangir til Magna Christiansen.

## Barnatrúgvin

Martin hevur altíð verið kristin. Eins og føroyingar flest fekk hann kristnitrúnna í barndóminum, og hóast hann á yngri døgum dámdi væl at koma við útsøgnum sum: "Tað er ikki Guð, sum hevur skapt menniskjuna, men menniskjan sum hevur skapt Guð", so hevur hann ongantíð verið ateist.

- Tað plagdi at vera ein hobby at fara inn í Ebenezer aftan á dansin og seta tey føst í ymiskum sonevndum andsøgnum úr Bíbliuni, men í dag pástandi eg, heilt og fast, at einki fær sannført meg um, at mín trúgv ikki er rætt. Eg eri eitt rættiliga rationelt menniskja, og um eg hyggi at øllum tí, ið er hent í mínum lívi, síðan eg byrjaði at taka Bíbliuna og bønina í álvara og til í dag, so er eingin onnur forklǻring, enn at Guð er til, sigur Martin við nógvari sannføring í røddini.

## Guð er við

Martin greiðir frá, at hann síðan miðskeiðis í nítiárunum hevur latið ymiskt upp í hendurnar á Guði, og hvørja ferð við sera góðum úrsliti. Kristnitrúgvin hevur hjálpt honum burturúr rúsdrekkatrupulleikum og gjørt hann roykfrían, umframt at vera ein stuðul í stríðnum móti krabbameini.

- Eg eri ikki idiot, - eg veit, eg skal doyggja einaferð. Men eg veit eisini, at tað hendir ikki, fyrr enn Gud vil tað. Eg doyggi ikki av kreft, uttan so at Guð onkusvegna loyvir tí. Eg eri varin við at snakka um leking og grøðing, men eg kann ikki lata verða við at kombinera tað, at so nógv er hent, síðan eg byrjaði at biðja til dagin í dag. Har er so nógv, sum eg ikki kann forklára á annan hátt, enn at Guð er við.